# Næstan eingin áhugi fyri oljuleiting við Ísland

**Tá íslendingar herfyri bjóðaðu oljufeløgum at leita eftir olju og gassi undir havbo0tninum, tóku bara tvey feløg av. Nú hevur annað sent avboð**

OLJUVINNA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Fyrradagin fekk Orkustovnurin í Reykjavík bræv frá norska ferlagnum Aker Exploration. Í brævinum boðaði norska felagið frá, at tað hevði gjørt av at taka aftur umsóknina um at sleppa at leita eftir olju og gassi undir íslendska havbotninum.

-Vit hava gjørt eina strategiska eftirmeting nú í summar og hava gjørt av at sleppa Íslandi, sigur Bård Johansen, stjóri í Aker Exploration, við Aftenposten.

Sostatt hevur Orkustovnurin bara eina umsókn eftir. Tað er ein felags umsókn frá feløgunum Sagex Petroleum og Lindir Exploration, sum er eitt íslendskt felag. Tann umsóknin verður nú viðgjørd í Reykjavík.

Frammanundan hevur amerikanska felagið ION GX Technology loyvi at leita eftir olju og gassi í einum parti av Drekaleiðini.

### Eysturgrønland spennandi

Avboðini frá Aker Exploration taka neyvan vónina frá íslendingum. Í hesari vikuni er eitt íslendskt skip farið at virka sum hjálparskip hjá einum norskum rannsóknarskipi, sum ger seismiskar kanningar við Eysturgrønland.

Norska skipið fer at kanna leiðina úti fyri Scoresbysund og Angmagsalik og suður ímóti Hvarvinum.

Eitt amerikanskt felag hevur fyrr mett, at nakrar av teimum størstu oljulindunum í heiminum eru undir havbotninum úti fyri Eysturgrønlandi. Sambært amerikonsku metingini fjalir havbotnurin har tvær ferðir so nógv olju sum allar leiðirnar í norska havinum.




*(Kort Morgunblaðið)*

# Flyta hús úr Føroyingahavnini til leguplás

LEGUHÚS
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nú um dagarnar fóru fleiri fólk frá Brøðrasamkomuni til Grønlands. Ørindini vórðu at hampa um og umvæla leguplássið í Naalersitaq nærhendis Nuuk. Hetta er eitt slag av Zarepta fyri grønlendsk børn og ung, sum føroyska Brøðrasamkoman stendur fyri. Á hvørjum sumri fara fólk frá samkomuni til Grønlands at geva leguni eina bøtandi hond. Men hesaferð varð ferðin eitt sindur serstøk. Uppgávan var nevniliga at flyta ein av bygningunum, sum hevur staðið í Føroyingahavnini til leguplássið. So partur av tí, sum varð føroyska hjartað í Grønlandi á sinni, verður nú endurbrúkt á leguni hjá Brøðrasamkomuni. Birgir Høgnesen frá Miðlahúsinum tók myndina av nøkrum av fólkunum, sum fóru til Grønlands umvegis Ísland herfyri. Ferðalagið taldi 10 fólk 8 menn og 2 kvinnur, sum skulu sigla úr Nuuk inn til staðið Naalersitaq. Á myndini eru: Jógvan Johannesen, Pauli Heinesen, Súsanna Heinesen, Ernst Vágsgarð, Arni Olsen og Maller Jacobsen. Á myndini vænta Gustav Samuelsen, Alvilda Samuelsen, Tormóður Mouritsen og Símun T.Hansen









